# Foreldrakunning til heimasetningin

Í døgunum 16. mars – 24. apríl fara vit hava miðvísa lesiskeiðið í 4. – 6. flokki í skúlanum við Løkin.

**Endamál**

Endamálið við miðvísa lesiskeiðinum er at halda lesingina við líka, at menna tryggu og skjótu lesingina og at víðka orðfeingið. Fleiri kanningar seinastu árini hava staðfest, at næmingarnir í miðdeild gevast at lesa av egnum huga. Á hesum lesiskeiðinum fara næmingarnir at lesa nógvar ymiskar bøkur. Harvið vóna vit, at næmingarnir fáa hug at lesa meira. Vónandi taka tit taka undir við hesum.

**Skipan**

Lesiskeiðið verður næstu 5 vikurnar. Vit fara at arbeiða við at automatisera orð, lesiferð, orðfeinginum og við nógvari lesivenjing. Tá ið børn lesa einsamøll, skal bókin ikki vera ov torfør. Ein vegleiðandi regla er, at í miðdeild eiga næmingarnir at megna at lesa umleið 120 orð um minuttin og at lesa 98 av 100 orðum rætt í løttum aldurssvarandi teksti.

Hvørja viku arbeiða vit við einum høvuðsmáli, sum tit heima skulu hjálpa at venja. Talvur eru í arbeiðsheftunum hjá næmingunum til endamálið, og við endan á vikuni skulu næmingarnir eftirmeta høvuðsmálið, sum teir hava arbeitt við ta vikuna. Í flokkinum meta vit eisini um bindindi, og tað skulu tit eisini gera heima.

**Foreldrauppgávan**

Tykkara uppgáva er:

- at stuðla, soleiðis at tykkara barn lesur minst 20 minuttir hvønn einasta dag
- at lurta, ímeðan tykkara barn lesur nakrar síður upp fyri tykkum*
- at tosa um, hvat bókin er um
- at vátta í lesilogginum, og at hjálpa barninum at minnast til vikumálið, sum er í lesilogginum.

Allar neyðugar talvur eru í heftinum til lesiskeiðið.

**Gransking hevur víst á, at vit minnast bæði orð og tekst munandi betur, tá ið vit lesa upp.*
*Tá ið vit lesa upp, brúka vit bæði eygu og oyru, og vit siga orðini – alt í senn.*

Vónandi taka tit foreldur undir við hesum og gera tykkara part, soleiðis at lesiskeiðið fer at gera mun og bøta um lesimenning, lesigleði og lesivanar hjá tykkara barni.

Vegna skúlan við Løkin

Pálin Olsen, lesivegleiðari